Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

CITROEN BX
1.9 GTI, leðurseður, centrallás, servostýring, km 108.000, árg. 89.
Tlf. 310829, Pætur

FORD CIERRA 1600
árg. 84, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 332551

FORD ESCORT
árg. 89 til sølu.
Tlf. 441193

FORD FIESTA
árg. 1987, við skaða v/ framman, kann koyra. Einans koyrt 36.000 km.
Tlf. 316005

FORD TRANSIT
vørubilur árg. 88, uttan motor, til sølu fyri hægst bjóðandi.
Tlf. 455340

GEARKASSI
til Ford Sierra ynskist til keyps.
Tlf. 421488

KÚFANGARAR
Tveir kúfangarar aftan og fremman til Ford Sierra árg. 87-90, til sølu.
Tlf. 371532

HONDA ACCORD 2.0
Um hóskandi boð fæst, selja vit eina sera væl hildnan Accord 10/91. Hann hevur el-spegl, -rútar og powerstýring. Hevur hetta tín áhuga, so ring tlf. 456360
ella 216360

HYUNDAY
Sonata, 1.8i árg. 90, koyrt 120.000 km. Bilurin er gráur, við 15" alu-felgum, senkaður. Bilurin sær gott út, uttan sum innan. Prísur 20.000 kr.
Tlf. 220744

JEEPUR
Galloper jeepur til sølu, 7 pers.
Tlf. 424513,
mobil 220421

MAZDA
E2200 lastbilur, diesel, motorur í besta standi, bilurin krevur ábøtur, tí best egnaður til eykalutir.
Tlf. 456277
ella 289277

MAZDA 323
árg. 84, til sølu. Koyrir væl, nógvar nærum nýggjar deilir.
Ring 441145

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

MAZDA 323 1.6
grønur, model við klapplyktum, árg. 93. Bilurin sær gott út og er sera økonomiskur. Til sølu ella í býti við diesel bil.
Tlf. 283902

MAZDA 323 1.6
grønur, model við klapplyktum, árg. 93. Bilurin sær gott út og er sera økonomiskur. Til sølu ella í býti við deisel bil.
Tlf. 283902

MERCEDES
280 SE, árg. 1984-85, 6 cyl. 2,8. Nýsynede i flot stand »sort« sælges billigt.
Tlf. 221021

MITSUBISHI
Pajero 2.3 turbo diesel árg. 86, longra model, setur aftan, í góðum standi. Nýsýnaður og motorurin hevur koyrt 102.000 km. Ein motorur og skermar fylgja við sum eykadeilir.
Tlf. 211543

MITSUBISHI
Shogun til sølu sum eykalutir.
Tlf. 216464

MITSUBISHI
PAJERO 2.3 turbo diesel árg. 86, longra model, setur aftan, í góðum standi. Nýsýnaður og motorurin hevur koyrt 102.000 km. Ein motorur og skermar fylgja við sum eykadeilir.
Tlf. 211543

NISSAN
Bluebird, 2.0 GLX, 1984, cantral lás, sportfelgur, aut. gear, el-rútar, i flot stand, sælges billigt.
Tlf. 221021

NISSAN 1.8 TURBO
Ein Nissan Bluebird T12 hevur 135 HK, powerstýring, autopilot, sony anl. o.a.
Tlf. 310485 ella 210326
helst eftir kl. 15

NISSAN LAUREL 2400i
6 cyl., árg. 1986, km 125.000, nýsýnaður tann 17/2-2000, í góðum standi, til sølu fyri kr. 28.000. Áhugað vera at ringja til
tlf. 448452 ella 218452

NISSAN PATROL
3.3 TD, til sølu. Hevur nakrar krossar, verður seldur bíliga.
Tlf. 216643

NISSAN PATROL
3.3 turbo diesel, árg. 86, hevur koyrt 177.000 km. Í góðum standi. Prísuppskot: kr. 35.000,-
Tlf. 212220 ella 321530

NISSAN SUNNY 1.6
árg. 88, koyrt 160.000. Bilurin sær gott út og er útgjørdur við króki. Prísuppskot: 18.000,-
Tlf. 216143

OPEL ASCONA 1.6
til sølu. Hevur skaða vinstru megin framman, fýra summardekk við felgum fylgja við, fyri 3.000 kr.
Tlf. 333445 ella 211445

OPEL REKORD 2.0 D
GLS, árg. 85, til sølu, ella í býti við eina teldu við øllum hentleikum.
Tlf. 441097 ella 212037

OPEL MOTORUR
Ein motorur til Opel Kadett C frá 1975 ynkist til keyps. (Ein forhjulstrektur kann kanska brúkast)
tlf. 216409

OPEL REKORD
st.car, árg. 84, til sølu sum eykalutur fyri 3000 kr.
Tlf. 282472

OPEL VECTRA 2.0
TDI, árg. 7/98, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 282744

ORGINALAR
Mercedes felgir 14" við dekkum, prísur 500,00 kr.
Tlf. 221021

ÓTRÚLIGT!
Ford Mondeo til sølu. Bilurin er frá 99. 50.000,- í avsláttri av nýprísinum. Hevur øll garanti.
Tlf. 216643

SETTUR
Toyota Hi-Ace til sølu. Motorurin er góður og annað leyst er, sum kann brúkast.
Tlf. 421015 best eftir kl. 17

SPORTFELGUR
Sportfelgur o.a. til Toyota Landcruiser til sølu.
Tlf. 215012 ella 445012

SPORTFELGUR
15" alu-felgur, bóltavstandur 108 mm, passa til allar Ford bilar, Peugeot bilar, Audi 80 og 100, Citroen BX, Saxo 2x/Xantia, Xsara, Saab 900 og 9000.
Tlf. 220744

SPORTFELGUR
4 stk. 15" sportfelgur v. 195/50-15" Riken dekkum til sølu.
Tlf. 216417 ella 371604
eftir kl. 18

SUBARU
GTI 1.8, árg. 1987, bíliga til sølu, skal sýnast.
Tlf. 319963

SUZUKI SWIFT
4x4, árg. 90, nýsýnaður tann 18.2.2000, í góðum standi, til sølu. Boð ynskist. Vinarliga ring aftaná kl. 17.30.
Tlf. 318808

TOYOTA CARINA 1.8
GLI, árg. 88, við skaða, til sølu.
Tlf. 445012 ella 215012

TOYOTA COROLLA
1.3, árg. 1/99, koyrt 14.000 km, 4 eyka felgur, hvítur, til sølu. Nýprísur: 149.900, til sølu fyri 125.000 kr.
Tlf. 211981 ella 319840

TOYOTA COROLLA
2.0 diesel, vøruvognur árg. 97, 85.000 km. sær út sum nýggjur.
Tlf. 455340

TOYOTA COROLLA
model EE90, seadan árg. 87, automatgear. Bilurin er í góðum standi, koyrt 70.000 km, nýlakeraður og sýnaður í jan. 2000.
Tlf. 456277 ella 289277

TOYOTA COROLLA 1.3
árg. 87 til sølu. Bilurin er nýsýnaður og í góðum standi.
Tlf. 315218

VOLVO
244 DL til sølu. Sýnaður januar 2000.
Tlf. 316074

TOYOTA TERRA
Diesel, st. árg. 5/99 við eyka sportfelgum, til sølu vegna flyting.
Tlf. 332466

UM HÓSKANDI BOÐ FÆST
selist ein Opel Ascona 1.6, árg. 86. Hevur skaða framman, fýra summardekk við felgum fylgja við. Áhugaðir ringi
tlf. 333445
ella 211445

VOLVO 240 GL
árg. 88, aut. gear, powerstýring og hiti í setrum. Sera væl hildin, koyrt 212.000 km, píkadekk og summardekk á felgum fylgja við. Bíliga til sølu.
Tlf. 447041 best eftir kl. 17

VOLVO 340
diesel, til sølu fyri 3000 kr. Hevur ávís brek.
Tlf. 421011
ella 210311

VW–TRANSPORTER
LT 31 Turbo, diesel, árg. 89, koyrt 176.000 km. til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 213096
og 316092

YMIST TIL DAIHATSU CHARMANT
Ein høgra bakhurð, motorur + gearkassi til Daihatsu Charmant, alt í góðum standi, til sølu.
Tlf. 371532

YNSKIST
Bakrútur til Toyota Corolla, sedan, árg. 88, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 220369 ella 315480

YNSKIST
Dieselpumpa ella komplettur dieselmotorur til Volvo 340.
Tlf. 421011
ella 210311

Amboð

SÚKKLUHANDILIN Í KOLLAFIRÐI
Nýheimkomin píkadekk
24", 26" og 28 x 1 3/8
250 kr. stk.
Søla og umvælingar
Tlf./Fax 421511

EIGUR ONKUR
ein stiga at selja mær bíliga.
Tlf. 361435

JARNSAKSUR TIL SØLU
Klippir longt 40 cm. trúgd 3,5 mm, bíliga til sølu.
Tlf. 311631

TIL SØLU
Kjøtsag til sølu fyri 4.000,00 varmablásari fyri 1.000,00
Tlf. 311346

TIL SØLU
Smergel slípimaskina, 2 slípisteinar d. 35 cm, bíliga til sølu.
Tlf. 311631

Arbeiði

ALT
timbur og stoypiarbeiði verður gjørt.
S/pf FN Contractors
v/ Finnbogi Niclasen
Tlf. 211926 og 220219

HEY!
Eg eri ein 14 ára gomul álítandi genta ið ynskir arbeiði, alt hevur áhuga. So um tú hevur nakað, so bara ring.
Tlf. 317367, Irdi

HÚSKALLUR
M/K 17-25 ár, søkist til arbeiði á bóndagarði í Íslandi.
Tlf. 00354 4341541

Barnaútgerð

BRIO COMBIVOGNUR
Marinbláur leðurlook Brio combi vognur við leðurkoyriposa og regnslag til sølu fyri 3000 kr., bert 15 mðr. gamal.
Tlf. 421680 best eftir kl. 18

ER TAÐ NAKAR,
ið hevur ein gamlan vogn ella Brio stell at selja mær bíliga.
Tlf. 310529

KOYRISTÓLAR
2 koyristólar til sølu fyri 500 kr. hvønn.
Tlf. 371843

TRÆGRULVIGARÐUR
til sølu. Vinarliga ringið
tlf. 311012 ella 212822

TVÍBURÐAVOGNUR
til sølu.
Tlf. 451277

Barnaansing

BARNAANSING
25 ára gomul genta, sum gongur í skúla seinnapart, átekur sær at ansa børnum fyrrapart.
Ringið 31 98 35

EG SØKI
eftir eini pleygumammu (ikki roykjari), til tveir dreingir, 1 og 3 ár. Um áhuga,
ring 312135

GENTA
søkist í húspláss at ansa eftir tveimum børnum. Frí hvørt vikuskifti. Kost + logi er afturat lønini. Ring skjótast gjørligt.
Tlf. 444815

SØKT VERÐUR
eftir gentu/kvinnu at ansa eftir 2 1/2 ára gamlari gentu.
Tlf. 448183

Bátaútgerð

BÁTAVOGNUR
til sølu.
Tlf. 361727
aftaná á kl. 19

BÁTUR TIL SØLU
Aramis BcF 30 fót, 160 HK motor, koyrt 2400 tímar, ferð: 14 míl, 5 el. snellur, alla nautiska útgerð, sum nýggjur.
Tlf. 373302
ella 214302

DYNAMO
av slagnum Bosch til sølu.
Tlf. 361727

EYKALUTUR TIL MOTOR
Eigur tú eina tendring til ein einkultan FM-motor 4 HK, sum ikki verður brúkt, so ring vinarliga til
tlf. 455083 ella 456860

HVALVÍK 800 TIL SØLU
hevur ein 128 HK Ford Marina, radara, ekkolod, VHF, GPS Plottara, oljufýr, gummibát, fyri uml. 250.000 ella hægstbjóðandi.
Tlf. 318477 ella 211298

NAKRIR
stampar av línu 4,5 mm og 4 mm til sølu.
Tlf. 361727

Bingo

BINGO
verður í Framtíðini í Vági tórskvøldið 2.3. kl. 19.30. 300 kr. og 1/2 krov aðruhvørja ferð fyri fulla plátu. 200 kr. fyri 2 rekkir annaðhvørt spæl.
Vágs Matmøðrafelag

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum tórsdagin 3. mars kl. 19. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2x500 kr. Annaðhvørt bingo 300 kr. og annaðhvørt 1/2 krov.
Tvøroyrar Bóltfelag

BINGO
verður í Mettustovu mánakvøldið 6. mars kl. 19.
Kvinnufelagið

GOTT BINGO
í Pállstovu sunnudagin 5. mars kl.16 Gávukort til fulla plátu. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum vikuskiftisferð. 15 plátur 100 kr. Eykaspæl verður.
Kyndil

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 12. marts. kl. 16. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspælið nú gávukort á 1.900 kr. 10 lutir á lutaseðlinum. Øll eru vælkomin.
Bygdarfelagið Varðin

GOTT BINGO
verður í Pállstovu hósdagin 2.mars.kl. 19,00. Nógvir góðir vinningar. 500 kr til fulla plátu. Á lutaseðli trý gávukort á 1.000 kr. 15 plátir fyri 100 kr. Eykaspæl verður . Øll eru hjartaliga vælkomin. Koyring heim aftaná.
Kyndil

GOTT BINGO
verður í Havnar klubba mánadagin 6. mars kl. 19. 15 plátir 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli, vikuskiftisflogferð. Økeypis kaffi. Koyring heim aftaná.
Astma/Allergifelagið

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Pállstovu hvørt mikukvøld kl. 19.00. Full pláta 500,- + síðuvinningar. Drigið millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlunum m.a. 4 gávukort á 500 og 1 á 1.000. 15 plátir 100,-. Eykaspæl. Koyring heim.
Stuðlafelagið Glottin

Burturm. / funnið

SAMSUNG
camera er funnið leygarmorgunin 19.
Tlf. 221303

SÚKKLA FUNNIN
Ein grøn damusúkkla av merkinum Dawes er funnin í Norðragøtu, eigarin kann venda sær til
Tlf. 442045

ÚTLEIGAN TIL GOYMSLU
Kjallari í Tórshavn er til leigu.
Tlf. 319239

Býli

3 KAMARS ÍBÚÐ YNSKIST
fram til 1. sept., kann vera møblerað. Leigari kann gjalda 3 mðr. fram.
Tlf. 220037
ella 220011

ELDRI HÚS YNSKJAST TIL KEYPS
í Tjørnuvík ella Eiði, fyri ein rímiligan prís.
Tlf. 318133
aftaná kl. 18

HÚS Í KVÍVÍK
til leigu í vikuskiftinum, allir hentleikar, gott útsýni yvir bygdina.
Tlf. 447031

HÚS Í VÁGI
til leigu fyri 2000 kr. pr. mðr. + nýtslu.
Tlf. 374433
ella 374900

HÚS TIL SØLU!
Hús í miðbýnum til sølu um nøktandi boð fæst.
Ringið 220425
eftir kl. 18

HÚS YNSKJAST
Hús, yngri sum eldri, ynskjast til leigu í Rituvík ella á eystara armi á Skálafjørðinum frá juni. Alt hevur áhuga.
Tlf./fax 0047 51710065

HÚS YNSKJAST
til leigu miðskeiðis í Vestmanna. Fam. við trimum børnum søkir hús til leigu miðskeiðis í Vestmanna frá 1. aug. 2000.
Tlf. 0045 75471805

HÚS YNSKJAST
Hús ella íbúð ynskist til leigu í Rituvík ella á Eystara armi á Skálafjørðinum frá juni. Alt hevur áhuga.
Tlf. 447610 ella
0047 93698259

HØLI TIL LEIGU
til skrivstovu ella forrætning.
Tlf. 315438

ÍBÚÐ Í HAVN
ynskist til friðarligan ungan mann. Vinarliga ringið á
tlf. 221533

ÍBÚÐ Í HAVN YNSKIST
Ungur maður við føstum arbeiði søkir íbúð/stórt kamar. Fer væl um.
Ring 210262, Janus

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Vit ynskja at leiga eina íbúð í Keypmannahavnarøkinum í tíðarskeiðnum aug./sept./okt. Møguliga í býti við íbúð í Havn.
Tlf. 316164

ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN TIL LEIGU
frá umleið 1. apríl, til eitt fólk, atgongd til vaskirúm. Leiga 3.500 pr. mðr. við el og hita.
Bill.mrk. 456782

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt par, við einum barni, søkir íbúð í Havn. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 328141 ella 328160,
Arna og Aksel

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru tvey einlig fólk, ið søkja íbúð í Havn ella nærhendis Havnini. Pálitiligir gjaldarar. Drekka og roykja ikki.
Bill.mrk. 190781

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðanfyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 835
Stað: Tórshavn
Slag av húsum: Íbúð undir Fjalli ella Berjabrekku
Stødd: Egnað til tvey fólk
Kostnaður: Einki krav

Nr. 847
Stað: Tórshavn, Argir ella Hoyvík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 100 m² (helst 3 kømur)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.200.000,-

Nr. 851
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Lítil hús (møguliga sjálvur seta tey í stand)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 600.000,-

Nr. 853
Stað: Skála kommunu
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Minst 2 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Nr. 854
Stað: Klaksvík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Minst 2 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 500.000,-

Nr. 855
Stað: Tórshavnar kommuna
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Minst 120m² (4 kømur)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.300.000,-

Nr. 857
Stað: Tórshavn (ikki ov langt frá miðbýnum)
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Umleið 100 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 900.000,-

Nr. 859
Stað: Tórshavn ella Argir
Slag av veiðu: Sethús við kjallara
Stødd: Umleið 120 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.200.000,-

Nr. 860
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Íbúð helst Berjabrekku
Stødd: Egna til eitt fólk
Kostnaður: Einki krav

Grundøki

Nr. 839
Stað: Tórshavn, Argir ella Hoyvík
Slag: Ídnaðarøki
Stødd: Uml. 500 til 2000 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 700.000,-

Nr. 858
Stað: Tórshavn (helst við Dalavegin)
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Uml. 400 til 600 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 370.000,-

Húsamekling Sp/f Protek,
Vagliið • Boх 331 • 110 Tórshavn,
Tlf. 319321 • Fax 319331
E-mail: protek@post.olivant.fo
Avgreiðsla kl.10-12 og 13-16.
Keyp og søla av fastari ogn

ÍBÚÐ SØKIST
Eg søknist eftir eini bíligari íbúð frá 1. mai.
Tlf. 371330

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Stór íbúð til leigu í Havn fyri friðarlig hjún, sum fara væl um frá 1.3.
Tlf. & fax 0045 86125554

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit eru álítandi, friðarlig og fara væl um.
Tlf. 316372 ella 221502,
Mirjam og Jan

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn til trúgvandi fólk, má hava 2-3 kømur. Vinarliga ring
tlf. 283812

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð, helst við tveimum kømurum, ynskist til leigu í Havn. Prísur: max. 4.000 kr. mðr. við ljós og hita.
Tlf. 318233

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð í Havn ynskist til leigu skjótast møguligt. Ikki meira enn 3.500,- um mánaðin. Farið væl um.
Tlf. 317162 eftir kl. 17

SETHÚSAOGN TIL SØLU
Ognin Víkavegur 15 í Klaksvík, verður hervið lýst til sølu.
Tlf. 455602

KAMAR TIL LEIGU
Gott møblerað kamar til leigu 1. mars. Atgongd til køk, bað, mynttelefon, vaskimaskinu og aðrar hentleikar. 5 min. gongd til Læraraskúlan.
Tlf. 313799

KAMAR YNSKIST
Eg eri ein 21 ára gamal drongur við føstum arbeiði í Havn, ynski at fáa kamar, sum helst passar til leið 2, av tí at mítt arbeiðspláss liggur í Havnardali.
Tlf. 447811

SETHÚS Í VESTMANNA
til sølu um hóskandi boð fæst, byggiár 1981.
Tlf. 424666

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes
E-postur: debes@post.olivant.fo

UNGT PAR
søkir íbúð ella verilsi í høvuðsstaðarøkinum. Alt hevur áhuga. Er nakar, sum kann hjálpa okkum, so ring tlf. 370141

Dansur

BARNAGRÝLUDANSUR
verður í VB-húsinum mánadagin 6.3.2000 kl. 18. Vakrasta og ljótasta grýlan fáa virðisløn.
VB

DANSITÓNLEIKUR
Mangla tit tónleikin til eitthvørt tiltak s.s. brúdleyp. føðingardagar o.a. So ringið til Njal og Mouritz.
Tlf. 444994 ella 444022

GRÝLUDANSUR
verður í VB-húsinum mánakvøldið 6.3.2000 »Ein blanding« spælir. Vakrasta og ljótasta grýlan fáa virðisløn.
VB

FØSTULÁVINTSHALD
Leygardagin 4.3. hevur Argja Róðrafelag føstulávintshald fyri børn og vaksin, børn kl. 14, kr. 20,-. Vaksin kl. 19, kr. 50,-. Kl. 23.30 spæla Driv til dans, kr. 80,-. 18 ára aldursmark.
Argja Róðrafelag

GAMLAMANNADANSUR
v/ Njál og Mourits, countrymusikkur verður í Sørvági 4.3. kl. 23.00. Eisini verða ljótasta og vakrasta grýla kosnar.
Sørvágs/
Miðvágs
Róðrarfelag

TUNNUSLÁING
og føstulávintsveitsla. Tekningarlisti til tunnuslátt og veitslu liggur frammi til tórskvøldið 2.3. kl. 22. í »Alduni«. Kostnaður 150,- kr. Fimmbogi og vinmenn spæla til dans.
Føstulávintsnevndin
í Sumba

Dýr

DVØRGAHAMSTRARAR
Ungar eru til sølu fyri 30 kr. stk.
Tlf. 457784 og spyr eftir
Jens Kartin

DVØRGAHAMSTRARAR
til sølu fyri 50 kr. stk.
Tlf. 315062

FRENSUR
5 mðr. gamal frensur verður latin djóravini. Av ymsum orsøkum kunna vit ikki hava hann meira. Hann er hvítur við einum gráum pletti á høvdinum.
Tlf. 312192 eftir kl. 16

GÁS BURTURBLIVIN
Grábøtur bøga, merkt við ringi á vinstra beini nr. 59. Helst farin á sjógv náttina til 27.2. í Koltri. Veit nakar um hana, vinarliga ring
tlf. 328190 ella 248800

GÁSASTEGGI
av føroyskum slag ynskist til keyps.
Tlf. 422099

HUNDA
transportkassi til stóran hund ynskist til keyps.
Tlf. 211515 ella 421710

HUNDAHVØLPAR
Tríggir hundahvølpar undan sera barnavinarligari tík, verða latnir djóravini.
Tlf. 310190 eftir kl. 17

HØSNARUNGAR
Tvær vikur gamlir høsnarungar til sølu.
Tlf. 452008

Fundir

AÐALFUNDUR
Ársaðalfundur felagsins verður í MBF húsinum leygardagin 4. mars kl. 15.00. Skrá samb. lógum felagsins. Aftaná fundin sigur Elin Mørkøre frá um nýggja kálkskannaran.
Gikafelag Føroya

ÁRSAÐALFUNDUR
felagsins verður á Muntra sunnudagin 5. mars kl. 16.00. Skrá sambært lógum felagsins.
IF

ÁRSAÐALFUNDUR
við verður skipaður av limum felagsins, verður í Árnafjarða skúla leygarkvøldið 25.3. kl. 21.30. Skrá samb. lógum felagsins.
Bygdarfelagið Báran
í Árnafirði

FRÁ NSÍ
Eykaaðalfundur verður í NSÍ Hølinum t. 8/3 kl. 19.00. Val av starvsnevndarlimum. Broyting av orðingini í § 18.
NSÍ

Húsarhaldstól

FRYSTISKÁP TIL SØLU
Eitt frystiskáp 82 h.x60 b.x60 d, 4 skuffur til sølu vegna keyp av størri, 500 kr.
Tlf. 315152 aftaná kl. 18

KØLI- FRYSTISKÁP
Bert 5 ára gamalt Electrolux køli- og frystiskáp til sølu 155x60. Frystiskápið hevur tríggjar skuffir. Er væl viðfarið og sær út sum nýtt.
Tlf. 444816